# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Úrslit sum væntað

Valúrslitið gjørdist í stóran mun sum væntað sambært veljarakanningunum. Veljarin valdi flokkarnar við greiðastu útmeldingunum: loysing ella samband. Ein skal tí vera varin við at tulka valúrslitið sum eitt misálit á eitt nú løgmann, men onkur tulka valúrslitið sum eina álitisváttan til samgonguna, sum fekk 64,4% av atkvøðunum. Tveir av samgonguflokkunum stóðu seg hampiliga væl og tann triði hevði eina lítla afturgongd, nakað sum er heilt vanligt hjá tí, ið situr við ábyrgdini. Hetta skal tó sigast við eitt sindur av fyrivarni, tí flokkur løgmans hevur nakað at læra av hesum valstríðnum. Tað eru helst mong, sum halda, at Javnaðarflokkurin eigur at fara til løgtingsval við eini greiðari valskrá og ikki vera so afturhaldandi við at fara út sum flokkur. Alt valskeiðið hevur jú borið dám av, at Javnaðarflokkurin við tað, at hann hevur leiðsluna av samgonguni, hevur verið framúr loyalur móti samgonguni og tí hevur formaður floksins verið meira løgmaður enn floksformaður.

Tjóðveldi hevði lítla afturgongd, og mest sannlíkt stavar henda afturgongd frá rýminginum Karsten. Kanska verður hetta tó sum frálíður ein styrki fyri Tjóðveldi, sum er sloppið frá teimum mest populistisku elementunum, sum alt síðan flokkurin varð til, hava skapað trupulleikar. Sjálvstýrisflokkurin gjørdi eitt gott hál, men hetta man meira stava frá taktisku uppstillingini enn frá politiska boðskapinum, sum mangan var ørkymlandi, eitt sindur sveimandi, og við ikki sørt av andsøgnum.

Áhugavert við valinum var, at tey sum hava verið nógv frammi, eitt nú fjølmiðlafólk, skemtarar o.o. høvdu gott val. Við hesum eru Føroyar komnar við í altjóða rákið, har satsað verður uppá kendisar og juppiar. Hetta er ein heilt náttúrlig avleiðing av tí dominerandi leikluti, sum fjølmiðlar hava í nútíðarsamfelagnum. Tann, sum ikki meistrar fjølmiðlarnar, hevur lítlan møguleika – tann, sum ikki sæst alla tíðina er politiskt slættis ikki til! Hetta hevur Tjóðveldi skilt betri enn nakar annar, men eisini Sjálvstýrisflokkurin er væl við her. Spennandi verður, hvussu hetta fyribrigdi fer at ávirka løgtingsvalið. Sambandsflokkurin kom væl frá valinum, men er hann styrktur innanhýsis av hesum? Tað er meira enn ivasamt - vit gerast neyvan klókari fyrr enn á løgtingsvalinum. Hinvegin kann úrslit Sambandsfloksins uttan iva styrkja samgonguna, tí flokkurin hevur verið tann mest ivasami og harvið verið veikasta liðið í samgonguni. Tey ivandi eru kanska sissað og ger løgmaður tí klókt í at smíða meðan jarnið er heitt, um hann ynskir, at samgongan skal halda fram eftir tann 19. januar 2008.

**Sosialurin**

## Fólkatingsvalið – løgtingsvalið og nýggj samgonga



**VALANALYSA**
*Jan Müller, blaðstjóri*
*jan@sosialurin.fo*

VIT hava á hesum stað fyrr spátt, at Tjóðveldi og Samband fóru at fáa báðar fólkatingsmenninar. Tað hendi. Vit hava eisini gitt, at somu flokkar fara at vinna løgtingsvalið, og at teir sum rosinan í pylsuendanum fara at vinna dystsin um komandi samgongu, tvs. fáa tríggjar sigrar upp í slag. Hetta hava vit bygt á gongdina í veljarakanningunum men eisini á skiftið, sum hevur verið í politiska veðurlagnum nú í eina tíð.

Kann vera at hetta ljóðar sum at taka munnin ov fullan. At vit harvið halda, at Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin longu nú eins væl kunnu geva skarvin yvir. Sjálvandi kann hetta broytast, men hetta er so tað, sum hevur ligið í luftini í eina tíð, og tí átti tað eisini at verið eitt týðuligt signal til ikki minst Javnaðarflokkin til sjálvsannsakan.

HÓAST valluttøkan til eitt fólkatingsval er eini 20-25% lægri enn til eitt løgtingsval, so er valið í gjár kortini eitt gott barometur til løgtingsvalið. Tjóðveldi hevur sum vera man sum andstøðuflokkur eitt gott útgangsstøði. Vit fáa eisini fleiri nýggjar ungar veljarar til løgtingsvalið og vísir tað seg, at nógv ung halla til Tjóðveldi. Vit vita eisini, at nógvir traditionellir tjóðveldisveljarar fara ikki á fólkatingsval, og uppá hesa konto kann Tjóðveldi eisini vænta eina framgongd til løgtingsvalið. Samanumtikið merkir hetta, at Tjóðveldi kann koma at økja sín lut úr góðum 25% upp í 26 ella 27%.

TAKA vit so Sambandsflokkin, so kundi okkurt bent á, at eisini hann hevur møguleika at gera eitt enn betri løgtingsval. Edmund-effektin gjørdi seg galdandi til fólkatingsvalið. Til eitt komandi løgtingsval kunnu vit rokna við, at eisini Laksáfosseffektin fer at gera seg galdandi. Magni Laksáfoss hevur nevniliga, helst vil vilja, gjørt lítið við at profilera seg til fólkatingsvalið. Hann sparir krútið til løgtingsvalið. Verandi formaður í Sambandsflokkinum, sum mátti lúta fyri Edmundi, hevur eisini brúk fyri at profilera seg optimalt til eitt løgtingsval. Hann veit, at verður hann nr. 3 tvs. yvirhálaður av bæði Edmundi og Laksáfoss, so er hann ferdigur sum høvdingur í Sambandsflokkinum. Tá skal bara ein eykalandsfundur til at kjósa nýggjan formann og nýtt løgmansevni. Tá hevur Sambandið so fingið fullan valuta í polariseringstaktikkinum. Hetta átti at sagt okkum so mikið sum, at vit fara at síggja eina sera harða kapping millum oddarnar í Sambandsflokkinum, og tað er nettupp tað, sum skal til fyri, at ein flokkur kann vinna eitt val. Hetta kann merkja, at Sambandið fer at fáa hægri prosental til løgtingsvalið enn til júst farna val. Tvs. at hann fer møguliga at fara úr góðum 23% uppá 24 ella 25%. Kanska uppaftur hægri. Vit síggja eisini, at uppskotið um Føroyar sum eitt valdømi, hevur ikki skatt uppskotsstillaran. So kanska hann og flokkurin eisini kunnu heysta ógóðan av tí til løgtingsvalið.

OG her kemur so tann áhugaverda nýggja politiska støðan. Nú kunnu bráddliga tveir flokkar, um enn ósamdir í nøkrum, kortini samdir í øðrum, skipa samgongu. Teir kunnu megna at fáa gott og væl 50%, kanska heili 52% av atkvøðunum. So vil onkur siga, at hesir mótsetningarnir kunnu ikki saman. Her mugu vit ikki gloyma, at Tjóðveldi kann ikki liva við at sita í andstøðu í enn eitt skeið. Og innanhýsis kappingin í Sambandinum fer at gera, at vit møguliga fáa nýggj fólk í oddin, fólk, sum einki hava ímóti at royna nakað nýtt, og sum ikki siggja tað sum eina sjálvfylgju at skula halda fram í samgongu saman við Fólkaflokki og Javnaðarflokki. Kann Sambandsflokkurin entá fáa løgmann og um somu tíð fáa størsta mótstøðuflokkin " niður í knæ", tí hesin vil ofra nógv fyri at koma inn í hitan, so kann Sambandsflokkurin fáa bæði posa og sekk.

VIT eru eisini vitni til, at tað er tann meira tjóðveldisvinarligi vongurin í Sambandsflokkinum, sum gongur fram, Edmund/Johan Dahl-ásin, og við einum Magna Laksáfoss, hvørs sjónarmið eitt nú á vinnulívs- og skattaøkinum harmonera nógv tey hjá Tjóðveldinum, ber til at ímynda sær eina samgongu millum hesar báðar flokkar. Tjóðveldi veit, at skal tað inn í hitan, so er kanska einasta gonda leið saman við Sambandinum. Men so má Tjóðveldi eisini leggja fullveldisretorikkin á hyllina. Og tað hevur Høgni Hoydal longu innsæð og gjørt.

Kanska ein týðandi finna í hesum taktiska spælinum er uppskotið hjá Kai Leo Johannessen um eina fólkaatkvøðu um ríkisrættarliga spurningin í 2012, júst tá nýggja samgongan hevur sitið í fýra ár. Hetta uppskotið hóvar Tjóðveldinum sum fótur í hosu, tí so kann flokkurin við góðari samvitsku leggja fullveldisætlaninar á hyllina til 2012 og til ta tíð at menna samfelagið á øðrum økjum og fyrireika tað til fólkaatkvøðuna. Uppskotið hjá Kai Leo kom púra óvæntað fyri ikki langari tíð síðani, og hvør veit, kanska hevur tjóðveldisleiðslan teskað Sambandsoddinum hetta í oyrað, sum duraopnarin til eina tveyflokka samgongu komandi fýra árini og við einum sambandsmanni sum løgmanni.

HVAT kunnu so Jørgen og Jóannes gera fyri at forða hesum! Jørgen Niclassen hevði eitt sera gott val, hóast hann misti á stokkinum. Vit skulu so ikki gloyma, at Kallsberg verður við til løgtingsvalið, og har kann hann toga nakað aftrat inn til flokkin, so hesin betrar um sína støðu. Men spurningurin er, hvat Fólkaflokkurin skal brúka eitt gott løgtingsval til, um B og E longu hava ein plan. Javnaðarflokkurin vil sjálvandi gera alt fyri at vísa á tey góðu úrslit, sum hann m.a. hevur verið garantur fyri eitt nú á almanna- og heilsuøkinum. Og at búskapurin hevur tað gott. Hetta er bara ikki nokk til at venda gongdini hjá flokkinum. Løgmaður, sum eisini er formaður í Javnaðarflokkinum, hevur verið

*Framhald á síðu 11*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.